

# ÁRSFRÁGREIÐING 2021

REYÐI KROSSUR FØROYA

# INNIHALDSYVIRLIT

**Um Reyða Kross** ..... **5**
**Støðulýsing** ..... **6**
**Nevnd** ..... **7**
**Skrivstova** ..... **7**
**Endurnýtsla** ..... **8**
Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka ..... 9
Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu ..... 9
Endurnýtsluhandilin í Vági ..... 10
Klædnainnsavningin og klædnaskiljingin ..... 11
Bókasølan ..... 11
**Tilbúgving** ..... **12**
Hjálparnetverkið ..... 12
Flóttahjálpin ..... 12
Váða- og førleikameting ..... 13
Kropslig fyrstahjálp ..... 13
Ársins Fyrstihjálpari ..... 14
Samarittar ..... 15
**Sosialt arbeiði** ..... **15**
Vitjanartænastan ..... 16
Saman basa vit einsemi ..... 17
Mat- og Klædnahjálpin ..... 18
Samstarv við Barnabata um Jólahjálp ..... 19
Jólagávur til Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum, Barnaheimið og Kvinnuhúsið ..... 19
Integratión ..... 19
Familjulegan ..... 20
Familjuvinir ..... 20
**Innsavningar** ..... **20**
Filateli ..... 20
Peningakistlar ..... 20
Landsinnsavningin 2021 ..... 21
**Altjóða hjálpararbeiði** ..... **21**
Karmar ..... 21
Altjóða starvsfólk hjá RKF ..... 22
Kunningar- og rekrutteringsátøk ..... 23

Ófriður í Etiopia ........ 23
Neyðhjálp til Jemen ........ 24
Verja til neyðstaddar ungar kvinnur í Bangladesh ........ 24
Humaniter kreppa í Afghanistan ........ 25
Hjálparátøk í Malavi ........ 26
Jarðskjálvti á Haiti ........ 27
Øll hava rætt til koppseting ........ 27



"Einaferð fari eg at hava eina ótrúliga søgu at fortelja. Eg kenni á mær, at eg havi gjørt nakað gott, við at hjálpa hesum fólkunum og at gera lívið hjá teimum betri"

- Beneye, Etiopia, 2021 -

*Beneye er ein av teimum djørvu sjálvbodnu sjúkraflutningsføraunum hjá Reyða Krossi í stríðsherjaða Tigray landspartinum í Etiopia, sum setur lívið í váða fyri at bjarga øðrum.*



# UM REYÐA KROSS

Reyði Krossur er heimsins størsti humaniteri felagsskapur við umleið 14 mió. føstum sjálvbodnum. Í sambandi við bráðfeingis neyðhjálp og menningarsamstarv økist talið av sjálvbodnum, limum og starvsfólki. Endamálið hjá Reyða Krossi er at verja lív og heilsu, tryggja virðingina fyri menniskjanum, umframt at verja sínámillum semjur, vinalag, samstarv og varandi frið millum øll fólkasløg.

Í einum heimi við alt meira avbyrging, spenningum og valdsmisnýtslu er tað grundleggjandi, at Reyði Krossur virkar fyri teimum virðum og aðalreglum, ið tryggja virðing fyri menniskjanum. Harvið mennist grundarlagið fyri samstarvi millum lond og fólk um at finna loysnir til felags avbjóðingar. Reyði Krossur virkar tí áhaldandi í samljóði við sjey aðalreglur, ið tryggja, at alt virksemið hjá felagsskapinum er: *menniskjaligt, ópartískt, uttanveltað, óheft, sjálvboðið, ein eind og algildugt.*

Hugsjónin handan Reyða Kross er frá 1859, eftir at Henry Dunant sá ovurstóra tørvin á humaniterari hjálp í orrustuni við Solferino. Í 1863 varð Altjóða Reyða Kross nevndin, ICRC (*International Committee of the Red Cross*), stovnað, og innan eitt ár høvdu 12 lond skrivað undir hin fyrsta Genevesáttmálan. Hetta var søguliga sæð slóðbrótandi til frama fyri altjóða hjálpararbeiði. Altjóða nevndin arbeiðir í kreppu-, stríðs- og krígsstøðum. Genevesáttmálarnir frá 1949 og fylgiskjøl teirra, geva nevndini í Altjóða Reyða Kross heimild til av sínum eintingum at arbeiða í krígsførandi økjum og londum.

Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløg eru í 192 av heimsins londum. Reyði Krossur og Reyði Hálvmáni eru tvey heiti fyri sama felagsskap, og tey virka á bæði innlendisstigi og á altjóða stigi. Reyði Krossur Føroya (RKF) varð stovnaður 2. apríl 1926 og er eitt sjálvstøðugt felag. Í altjóða samanhangi eru Genevesáttmálarnir frá 1949 heimildargrundarlagið fyri virkseminum hjá Reyða Kross feløgunum, og RKF er í tí høpi partur av *Røde Kors i Danmark* (RKiD). RKF hevur áleið 300 sjálvboðin.

Altjóða føderatiónin av Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløgum, IFRC (International Federation of Red Cross and Red Crescent Societies), var stovnað í 1919. Altjóða føderatiónin er meginfelagið fyri tey 192 landsfeløgini og arbeiðir saman við Altjóða Reyða Kross nevndini, ICRC, og landsfeløgunum hjá Reyða Krossi/Reyða Hálvmána í sambandi við náttúruvanlukkur og menningarhjálp. Føderatiónin, IFRC, feløgini á tjóðarstigi og Altjóða Reyða Kross nevndin, ICRC, verða í felag nevnd Altjóða Reyða Kross og Reyða Hálvmána Rørslan. Øll hesi eru tvinnað saman við teimum sjey aðalreglunum.

# STØÐULÝSING

Árið 2021 var merkt av, at Reyði Krossur Føroya var í støðugari menning, bæði í vanliga virkseminum, í nýggjum virksemi og á altjóða pallinum.

Í 2020, tá koronukreppan tók seg upp, sóu vit, at RKF er ein munagóð stuðulseind hjá myndugleikunum, og ein virkin viðspælari, tá uppgávur skulu loysast her á landi. Hóast koronasmittan ikki fylti eins nógv í 2021, sum í 2020, so var virksemið í 2021 merkt av koronu og tilbúgvingin *Hjálparnetverkið ímóti koronu* var eisini virkin av og á. Eitt nú vóru endurnýtsluhandlarnir noyddir at lata dyrnar aftur, tá serliga nógv smitta var í landinum, umframt at annað vanligt virksemi mátti niðurleggjast. Eisini mátti árliga familjulegan tíverri avlýsast orsakað av serliga høga smittutrýstinum.

Men hóast koronu, er nógv hent í 2021. Nevnast kann millum annað, at fyrstahjálpin hevur verið í støðugari menning, har inntøkan er meir enn tvífaldað og nýggj fyrstuhjálparbók er týdd til føroyskt og givin út. Á vári 2021 var sjóneyka sett á einsemi, tá skipað varð fyri seks tiltøkum við heitinum “Saman basa vit einsemi” kring landið. Gongd varð sett á nýggja sosiala tænastu, “Familjuvinir”, ið er ætlað tilflytarum í Føroyum. Fleiri nýggjar kommunur eru lagdar afturat Vitjanartænastuni. Skipað varð fyri tiltakinum “Opið hús” í endurnýtsluni í Stiðjagøtu, og endurnýtsluhandilin í Vági fylti 10 ár. Samarittarnir vóru endiliga aftur til nøkur tiltøk og luttóku í venjing við Norðoyar Bjargingarfelag. Seinasta hond var løgd á Váða- og Førleikametingina fyri Føroyar, sum var løgd fram og givin út í bóklingi. Og fyri aðru ferð, varð Landsinnsavningin skipað sum ein beinleiðis sjónvarpssending, og sigast má, at innsavningin eydnaðist framúr væl við einum úrsliti á heilar kr. 3,4 mió.

Av altjóða hjálpararbeiði kann nevnast, at í november 2021 var eitt nýtt altjóða starvsfólk frá RKF útsent til Malavi at arbeiða við hjálpararbeiði innan veðurlagstøkni. Eisini læt RKF áleið kr. 5 mió. til altjóða humaniterar verkætlanir í sjey ymsum londum í 2021. Harímillum fóru kr. 1,5 mió. til hjálparátøk í Afghanistan, har størsta humanitera kreppan í heiminum leikaði á. Tað vóru millum annað ræðuleikarnir í Afghanistan, sum gjørdu, at RKF fór undir at fyrireika tilbúgvingina, *Flóttahjálpin*, sum skuldi vera klár at hjálpa, *tá* ella *um* flóttafólk koma til Føroya. Og hóast flóttafólk úr Afghanistan ikki komu hendan vegin, má sigast, at fyrireikingararbeiðið í 2021 kom væl við.

Samanumtikið hevur árið 2021 verið eitt sera virkið ár, har vanliga virksemið hevur verið í framgongd og nýtt virksemi er byrjað. Tørvurin á hjálpartænastum hjá Reyða Krossi, bæði í Føroyum og kring heimin, sær ikki út til at minka, og tað ber til at staðfesta, at við miðvísum arbeiði kunnu sjálvboðin, samstarvsfelagar og stuðlar gera stóran mun, bæði úti og heima.

Reyði Krossur takkar øllum hjartaliga fyri trúgva stuðulin í 2021.

# NEVND

Nevndin er evsti myndugleiki hjá RKF. Hon er mannað við 5 nevndarlimum og 2 varalimum, sum øll eru sjálvboðin. Nevndin verður vald á aðalfundinum. Nevndarlimirnir vera valdir fyri tvey ár, og varalimirnir fyri eitt ár. Annaðhvørt ár standa tveir nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa hinir tríggir fyri vali. Á mánaðarligum fundum viðger nevndin mál av týdningi saman við skrivstovuni. Sjálvboðin verða boðin við á nevndarfund, um tørvur er á tí. Í 2021 vóru 12 nevndarfundir hildnir.

# SKRIVSTOVA

Skrivstovan hevur ábyrgd av at skipa, reka og menna dagliga virksemið hjá RKF. Tað verður gjørt í samstarvi við nevndina, virksemisleiðarar og sjálvboðin. Skrivstovan hevur dagligu ábyrgdina av virkseminum hjá RKF.

Tvey starvsfólk arbeiða fast í umsitingini á skrivstovuni og vóru í 2021 lønt tilsamans 80 tímar um vikuna. Harumframt starvaðist verkætlanarsamskipari tíðaravmarkað í hálva tíð á skrivstovuni í 2021.

Í 2021 arbeiddi skrivstovan millum annað við:

- **Hjálpararbeiði** innan eitt nú sosiala økið, átøk til frama fyri viðkvæmar bólkar í Føroyum og innan altjóða humanitera hjálp.
- **Rakstur og menning** av virksemisøkjunum hjá RKF, t.d. samskifti við sjálvboðin, fíggjarviðurskiftum, kunning, heimasíðuni, sosialum miðlum, lýsingum og at loysa uppgávur saman við sjálvbodnum.
- **Samskipan** av tiltøkum og verkætlanum, t.d. átak ímóti einsemi, ársins fyrstuhjálpara, trivnaðartiltøkum fyri sjálvboðin, fundum, umframt ein sera virknan leiklut í at samskipa landsinnsavningina.
- **Samstarv** við eitt nú fyritøkur, kommunur, stovnar, *Røde Kors i Danmark*, *Rauði Krossinn á Íslandi*, *Malawi Red Cross Society*, felagsskapir og við Føroya Landsstýri.

# ENDURNÝTSLA

Endamálið við endurnýtsluvirkseminum er at savna pening til hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi, bæði í Føroyum og kring heimin.

Endurnýtsluvirksemið í Reyða Krossi veksur støðugt. Í 2021 vóru áleið 140 sjálvboðin í hesum virksemisøki, sum fevnir um klædnainnsavning, klædnaskiljing og klædnasølu.

Klædnainnsavningin savnar klæðir inn úr bingjunum kring landið, meðan Klædnaskiljingin skilir klæðini. Skildu klæðini fara síðan til:

- klædnahjálpina, sum hjálpir familjum, ið ikki eru so væl fyri fíggjarliga,
- teir tríggjar endurnýtsluhandlarnar, sum selja klæðir – ein á Bryggjubakka í Tórshavn, ein í Stiðjagøtu í Tórshavn og ein í Vági,
- umframt, at nakað verður sent til Týsklands til endurnýtslu.

Eisini verður í Reyða Krossi tikið ímóti bókum til bókasøluna í Vágsbotni, umframt frímerkjum og nakað av lutum.

Í september 2021 skipaði Reyði Krossur fyri "Opið Hús" tiltaki í endurnýtsluni í Stiðjagøtu. Tiltakið var væl eydnað, og eini 40 fólk møttu fyri at hoyra um sjálvboðið arbeiði í endurnýtsluni. Tá av tornaði, teknaðu 14 nýggj seg sum teknaðu seg sum sjálvboðin í klædnainnsavningini, klædnaskiljingini og handlunum.



*Endamálið við endurnýtsluni er at savna pening til hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi, bæði í Føroyum og kring heimin.*

## Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka



Sølan í Endurnýtsluhandlinum á Bryggjubakka í 2021 var kr. 137.944. Hetta er meir enn í 2020, tá inntøkan var kr. 85.000, og minni enn í 2019, tá inntøkan var umleið kr. 238.000. Høvuðsorsøkin til stóra munin er, at virksemið var nógv avmarkað fyri at verja sjálvboðin ímóti koronu-smittuni.

Handilin var nógv merktur av koronu í 2021. Handilin var stongdur við ársbyrjan, og opnaði aftur 11. februar. Fram til 23. apríl var handilin opin hósdagar og fríggjadagar. Frá 28. apríl var opið mikudagar eisini, og fram til 3. november var opið 3 dagar um vikuna. Síðan var stongt restina av árinum, orsakað av koronu.

Teir dagar handilin er opin, eru tvey sjálvboðin til arbeiðis, og opið er kl. 13.30 – 17.30. Einaferð um vikuna verða myndir av vørunum lagdar út á facebook-síðuna hjá handlinum.

Reyði Krossur hevur havt endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka síðani 2006. Handilin er skipaður við einum leiðara og hevur umleið 30 sjálvboðin knýtt at virkseminum.

## Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu



Sølan í Endurnýtsluhandlinum í Stiðjagøtu var metstór í 2021 - á heilar kr. 1.239.334. Í 2020 var inntøkan kr. 866.000, og í 2019 var inntøkan kr. 974.000. Barnadeildin stóð fyri 27% av søluni í 2021 – tað vil siga smáar kr. 333.000 av søluni.

Handilin var opin í tilsamans 43 dagar í 2021, sum merkir, at miðalsølan er kr. 28.821 hvønn søludag, sum er einastandandi flott. Í 2021 var handilin stongdur í tilsamans 4 vikur orsakað av koronu.

Síðan korona fór at gera um seg, hevur garasjan verið partur av handlinum, fyri at betri kunna fylgja tilmælinum um fráststøðu. Tað hevur eydnast sera væl at hava

handilin størri, og tí er avgerð tikin um, at garasjan framhaldandi verður partur av handlinum.

Tað hevur ikki verið stór útskifting millum sjálvboðin í Endurnýtsluhandlinum í Stiðjagøtu í 2021. Nøkur fá eru givin, og umleið 5 nýggj eru byrjað, umframt 5 nýggj í barnadeildini. Afturat hesum eru eisini nøkur nýggj komin afturat sum avloysarar. Skrivstovan hevur ábyrgd sum virksemisleiðari av Endurnýtsluhandlinum, samstundis sum vikuligu toymini hava ábyrgd fyri hvørjari viku sær, og barnadeildin hevur ábyrgd fyri sínum virksemi.
Handilin er opin leygardagar kl. 10:00 – 15:00. Endurnýtsluhandilin selur góð klæðir til børn, kvinnur og menn. Handilin er sera væl vitjaður - sum góða úrslitið eisini ber boð um - og tað er ikki óvanligt at síggja kø uttanfyri handilin leygarmorgnar, áðrenn dyrnar lata upp.

## Endurnýtsluhandilin í Vági

Í 2021 seldi endurnýtsluhandilin í Vági fyri kr. 127.456. Hetta er ein stór øking í mun til í 2020, tá sølan var kr. 78.500, og í mun til 2019, tá sølan var kr. 37.000.



Síðan 2020 hevur handilin hildið til í Handlinum í Gørðinum í Vági. Handilin er skipaður við einum leiðara, og umleið seks sjálvbodnum kvinnum. Av og á hava nakrar ungar sjálvbodnar eisini verið fúsar at taka myndir, og at leggja út á facebook- og instagramsíðurnar hjá handlinum.



*Mótasýning ísv. 10 ára føðingardagin*

Handilin er opin fýra dagar um vikuna: mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 14.00 til 17.30 og leygardag kl. 10.00 til 13.00.

Hin 28. mai 2021 varð hátíðarhildið, at 10 ár vóru liðin síðan Reyði Krossur læt endurnýtsluhandil upp í Vági. Til føðingardagin bjóðaði Reyði Krossur vitjandi kaffi og køku, formaðurin í Reyða Krossi segði nøkur orð, umframt at skipað varð fyri mótasýning, og Dagfinnur og Hjalmar spældu nøkur løg.

## Klædnainnsavningin og klædnaskiljingin

Klædnainnsavningin og klædna-skiljingin standa fyri at koyra kring landið at tøma bingjur við endurnýtsluklæðum, og síðan skilja tey innkomnu klæðini.




Reyði Krossur hevur 28 bingjur standandi kring landið: í Klaksvík, Fuglafirði, Saltangará, Miðvági, Vestmanna, Vági, á Tvøroyri og í Tórshavn. Klæðini verða koyrd til Stiðjagøtu 6, í Tórshavn, har tey verða skild.

Inntøkan frá klædnainnsavningini og -skiljingini fyri 2021 var kr. 309.782, í mun til 239.000 í 2020. Inntøkan stendst av sølu av endurnýtsluklæðum í Týsklandi. Í 2021 vóru 13 bingjur, við áleið 10 tonsum av klæðum í hvørjari, sendar til Týsklands, samanborið við 11 bingjur í 2020. Tíverri var kiloprísurin fyri endurnýtsluklæðir settur niður orsakað av koronu í 2020. Prísurin er tó farin nakað upp aftur í fyrru helvt av 2021, men enn er hann ikki komin upp á sama støði sum undan koronu.

Klædnainnsavningin telur umleið 25 sjálvboðin við avloysarum, og av hesum eru 3 knýtt at endurnýtsluni í Suðuroy. Umframt at savna inn klæðir kring landið, hevur klædnainnsavningin eisini ábyrgd av at koyra rusk og av at viðlíkahalda bingjurnar og bilin.

Klædnaskiljingin er skipað við einum virksemisleiðara og einum leiðara fyri hvønn skiljibólk. Eini 80 sjálvboðin eru regluliga virkin í klædnaskiljingini. Fleiri dagar um vikuna verða innkomin klæðir skild. Klæðini verða skild soleiðis, at ein partur fer í endurnýtsluhandlarnar á Bryggjubakka, í Stiðjagøtu og í Vági, ein partur fer til Klædnahjálpina, og ein partur verður sendur av landinum.

## Bókasølan

Inntøkan í Bókasøluni í 2021 var kr. 160.480, sum er nakað meira enn í fjør.

Vælvitjaða Bókasølan í Vágsbotni er eitt slag av sjálvtøku, har fólk sjálvi keypa og gjalda fyri bøkurnar. Bókasølan er opin sjey dagar um vikuna. Bókasølan er skipað við einum virksemisleiðara, og átta sjálvbodnum. Tríggir mans halda dagliga eyguni við Bókasøluni - teir eru framvið og hyggja, um nakað nýtt er komið, og tá neyðugt er, leggja teir nýggjar bøkur fram. Harumframt er føst skipan við at lata upp og læsa morgnar og kvøld.

Hvørt mikukvøld millum kl. 19.00 og 21.00 hittast sjálvboðin í Bókasøluni til ein kaffimunn og prát. Tá hava fólk eisini høvi at koma við bókum og øðrum.

Bókasølan fær allar bøkurnar ókeypis, og útreiðslurnar eru nærum ongar, og tí munar Bókasølan ógvuliga væl í virkseminum í Reyða Krossi.

# TILBÚGVING

RKF er virkin innan tilbúgving við fyrstuhjálparundirvísing, undirvísing innan sálarliga fyrstuhjálp, váðameting, samarittatænastu og hjálparátøk, tá kreppur raka. Eitt nú var hjálparátakið *Hjálparnetverkið* sett í verk, tá korona rakti í 2020. Og í 2021 var gongd sett á arbeiðið við hjálparátakinum *Flóttahjálpin*, ið hevur til endamáls at hjálpa, um ella tá flóttafólk koma til landið. At RKF nú er virkin innan tilbúgvingarátøk ber boð um, at arbeiðið tey seinastu árini at menna førleikar og karmar innan tilbúgvingina hjá RKF, hevur verið viðkomandi og munagott. Í stuttum kann staðfestast, at RKF nú er ein týðandi felagsskapur innan tilbúgving, tá kreppur raka í Føroyum.

## Hjálparnetverkið

Hjálparnetverkið hevur til endamáls at stuðla og hjálpa fólkiborgarum í Føroyum, tá kreppur raka, og varð íverksett, tá korona fór at gera um seg í 2020. Endamálið við Hjálparnetverkinum var at stuðla og hjálpa menniskjumborgarum við teimum avbjóðingum, sumið koronasmittan elvdi tilhevði við sær.

Hjálparnetverkið er serliga virkið, tá korona ger nógv um seg, og tí varvar sostatt nakað av virksemi í Hjálparnetverkinum í 2021. Eitt nú svaraði, so sum at tilbúgvingarnummarið 1818 fyrispurningum frá fólki, ið hsvaraði boðum frá borgarum, ið høvdu avbjóðingar orsakað av koronu.

## Flóttahjálpin

Við tí endamáli at hjálpa, har neyðin er størst, hevur Reyði Krossur skyldu til at hjálpa, *tá* ella *um* flóttafólk koma til Føroya. Flóttahjálpin er eitt netverk av sjálvbodnum og øðrum áhugaðum, hvørs endamál er at veita stuðul, hjálp og vegleiðing til flóttafólk í Føroyum.

Øll áhugað eru vælkomin at gerast sjálvboðin í Flóttahjálpini. Flóttahjálpin kann veita tænastur, so sum:

- Flutning og stuðul í sambandi við komu í Føroyum
- Sosialt netverk og stuðul við praktiskum viðurskiftum
- Hjálp at finna bústað, har tað er gjørligt
- Tulkatænastu á fremmandamálum
- Hjálpa fólki at finna burturmista familju gjøgnum *Restoring Family Links*

Arbeiðið at fyrireika Flóttahjálpina byrjaði á heysti í 2021, og í desember mánað fekk Flóttahjálpin tey fyrstu 25 sjálvbodnu.

## Váða- og førleikameting

Í 2019 var farið undir arbeiðið við eini váða- og førleikameting fyri Føroyar, ið varð skipað sambært altjóða leisti, sum Reyði Krossur brúkar um allan heim. Hetta arbeiðið varð tíverri nógv seinkað, serliga orsakað av koronu.

Kanningin bygdi á kvalitativar dátur frá áleið 30 umboðum fyri tilbúgving og viðkomandi stovnar á sosiala økinum í Føroyum, kvantitativar dátur frá áleið 520 tilvildarligum svarpersónum í Føroyum, umframt á *netkanning*, ið tók støði í teimum evnum og avbjóðingum, sum sóust í úrslitunum frá kvalitativa og kvantitativa partinum. *Betri Stuðulsgrunnurin* stuðlaði Reyða Krossi við kr. 200.000 til hesa verkætlan.

Váða- og førleikametingin lýsir og greinar møguligar humaniterar váðar í samfelagnum og hvaðani hesir váðar koma. Eisini viðger metingin, hvørjir samfelagsborgarar eru í størstum váða, og hvørjar førleikar og tilfeingi vit longu hava til at basa og fyribyrgja hesum váðum. Við støði í hesari vitan ber síðani til at skipa og menna hjálpararbeiðið hjá RKF á best møguligan hátt.

Í 2021 var arbeiðið við váða- og førleikametingini liðugt. Upprunaliga var ætlan at skipa fyri almennari framløgu – hetta mátti tó broytast til eina upptøku av framløguni, orsakað av koronu. Harumframt varð frágreiðing prentað og send til samstarvspartar og onnur áhugað.

Yvirskipað vístu úrslitini frá kanningini, at nakrir ávísir samfelagsbólkar vóru serliga viðkvæmir fyri at verða raktir av bráð- og langtíðarváðum og høvdu verri førleikar at handfara hesar váðar. Greiningar vístu millum annað, at serliga viðkvæmir bólkar vóru: láglønt, fólk við lágari útbúgving og fólk, ið eru likamliga ella sálarliga darvað.

Harumframt varð mett, at føroyska tilbúgvingin hevði nógvar styrkir, og at nógvar skipanir vóru at handfara bæði bráð- og langtíðarváðar. Tó vístu úrslitini eisini, at pláss er fyri batum og uppraðfestingum. Til dømis eiga hægri krøv at vera til tilbúgvingarætlanir, kunning og samskifti eiga at vera betri, sálarlig tilbúgving skal betrast, og heildarætlanir í sambandi við langtíðarváðar vanta.

## Kropslig fyrstahjálp

Reyði Krossur heldur, at øll eiga at duga fyrstuhjálp. Tí hevur RKF tillagað prísin á fyrstuhjálparskeiðum, soleiðis at enn fleiri hava møguleika at fáa undirvísing í fyrstuhjálp. Vert er at hava í huga, at í eini neyðstøðu kann fyrstuhjálparskeiðið merkja munin millum lív og deyða.

RKF hevur gjørt nógv burturúr at lýsa við og upplýsa um fyrstuhjálp í 2021, og tað sæst eisini aftur í tølunum. Í 2021 hevði fyrstahjálpin kr. 403.377 í inntøku. Hetta er kr. 235.752 meir enn í 2020, tá inntøkan var kr. 167.625 og inntøkan er sostatt meir enn tvífaldað frá undanfarna ári. Tilsamans vóru 773 prógv útskrivað frá Reyða Krossi í 2021, samanborið við 271 í 2020
Í eitt longri tíðarskeið hevur RKF arbeitt við at fáa fyrstuhjálparbók útgivna á føroyskum, og á heysti í 2021 kom fyrsta føroyska fyrstuhjálparbókin hjá Reyða

Krossi út í føroysku handlarnar. Í hesum sambandi varð eisini skipað fyri bókaútgávu, har øll áhugað vóru hjartaliga vælkomin á gátt úti í Stiðjagøtu, og høvi var at hoyra sjálvboðin greiða frá arbeiðinum við at útgeva bókina, umframt at bókin fekst til keyps.

Bókin kann síggjast sum liður í arbeiðssetninginum, at *øll eiga at duga fyrstuhjálp*. Tess fleiri fólk eru før fyri at geva fyrstuhjálp, tess størri er tryggleikin fyri okkum øll somul í gerandisdegnum. Bókin verður latin øllum, ið taka fyrstuhjálparskeið, og er fyrst og fremst ein lærubók.

Ein serlig tøkk til Joan Hovgaard, fyrstuhjálparinstruktør, sum sjálvboðin hevur týtt bókina til føroyskt, og til Hans Jákup Simonsen, ábyrgdarlækna hjá Reyða Krossi, fyri hollan stuðul og fakligt íkast. Eisini tøkk til onnur sjálvboðin innan fyrstuhjálpina, ið hava verið við í arbeiðinum, og til stovnar og ráðgevar fyri góðan stuðul og samstarv.

## Ársins Fyrstihjálpari




*Á myndini til vinstru sæst Suffía við familju, og ársins barnaheiður til høgru.*

Heiðurin sum Ársins Fyrstihjálpari 2021 fór til Suffíu Olsen fyri framúr avrik í likamligari fyrstuhjálp. Suffía og familjan ótu døgurða, tá pápi hennara brádliga fekk hjartasteðg. Meðan mamman og yngra systirin ringdu 112, var Suffía skjót at geva pápanum lívbjargandi fyrstuhjálp, til sjúkrabilur kom á staðið. Av tí at Suffía gjørdi so skjótt av og gav munagóða fyrstuhjálp, kann pápi hennara, Pauli, í dag liva eitt vanligt lív uttan varandi mein. Suffía vísir gott yvirskot og orku, at hon megnar at fáa lítlusystrina burturfrá saman við mammuni, hóast tær vóru ræðsluslignar. Tað krevur dirvi at halda høvdið kalt og minnast mannagongdirnar, tá ið ein, ið er so nær í familju, fær hjartasteðg.

Heiðursbræv varð eisini latið Gilla Sjúrðarsyni Holm, sum á sumri 2021 kom fram á ein mann, ið hevði fingið hjartasteðg. Gilli fór beint í gongd við at geva lívbjargandi fyrstuhjálp, til sjúkrabilurin kom á staðið. Lítil ivi man vera um, at hevði Gilli ikki verið á staðnum, hevði maðurin neyvan yvirlivað. Harumframt fáa starvsfólk á fyritøkuni Grant heiðursbræv fyri at veita góða fyrstuhjálp – bæði kropsliga og sálarliga – tá ið ein starvsfelagi var óheppin og skar seg illa av einum rúti.

Øll trý fáa heiðursbræv og blómutyssi frá Reyða Krossi, um framt at Ársins fyrstihjálpari 2021 fær eina peningagávu frá Betri.

Sum nakað nýtt í ár fáa fýra børn Ársins barnaheiður fyri serstakt avrik innan fyrstuhjálp. Talan er um tvær hendingar. Í einari av hendingunum fyribyrgja nakrir smádreingir eini vanlukku, tá teir leggja til merkis, at ein lastbilur, sum stevnir beint ímóti einum tunli, hevur gloymt at koyra kranan niður. Í hini hendingini bjargaðu tvær smágentur systkinabarni teirra, sum var dottin í ein djúpan hyl. Øll fýra børn fáa heiðursbræv umframt eitt gávubræv frá Bowling í Leirvík.

Reyði Krossur ynskir øllum hjartaliga tillukku við heiðrinum.

## Samarittar

Samarittarnir høvdu kr. 131.559 inntøku í 2021, sum er nakað meir enn inntøkan frá 2020, ið var kr. 70.401. Tó eisini nakað minni enn inntøkan frá 2019, ið var kr. 230.000.

Tó at korona hevur merkt virksemið hjá Samarittunum í 2021 nógv, hevur arbeiðsgongdin verið góð.

Samarittarnir høvdu eina sera góð venjing saman við Norðoyar Bjargingarfelag í mars 2021. Annars hevur verið smáligt við vaktum. Nevnast kann Bátafestivalurin á Toftum, The Fairy Islands festivalurin, Ólavsøkan, Regatta í Hósvík, Ovastevna, Voxbotn 2020 og Voxbotn 2021, Faroe Express stafettin, Rokkur í Vestmanna, Jól í Miðbýnum og Jólaguðstænastan.

Samanlagt vóru umleið 25-30 samarittar virknir í 2021, í áleið 1.000 tímum á vakt, umframt fundum og venjingum. Trivnaðurin er sera góður hjá Samarittunum.

*Betri* er høvuðsstuðul hjá Samarittunum. Stuðulin frá Betri ger sera stóran mun, og er eitt nú við til at styrkja karmar og umstøður hjá sjálvbodnum á samarittøkinum, og skal harumframt síggjast sum eitt stórt herðaklapp til tað framúr góða arbeiðið, sum samarittarnir gera í sambandi við at veita stuðul og fyrstuhjálp til tiltøk kring alt landið.

# SOSIALT ARBEIÐI

RKF hevur eina røð av hjálpartænastum innan sosiala økið í Føroyum, millum annað vitjanartænastu, mat- og klædnahjálp, bókagávur til børn kring landið, familjulegu fyri tilflytarar, familjuvinir fyri tilflytarar, gávukort til barnafamiljur í sambandi við Jólahjálpina í samstarvi við Barnabata og samstarv við Kvinnuhúsið.

## Vitjanartænastan

Vitjanartænastan hjá Reyða Krossi virkar fyri at basa einsemi og fyri at skapa trivnað. Stórur áhugi er fyri Vitjanartænastuni, og í 2021 var tænastan virkin í Tórshavn, Norðoyggjum, Suðuroy, Sandoy, Vágunum,Vestmanna, Kvívík og Nes/Toftum. Harumframt verður arbeitt fyri at seta Vitjanartænastuna á stovn fleiri aðrastaðni kring landið í 2022, og er formaðurin vanliga við, tá nýggjar tænastur verða settar á stovn. Hóast vitjanartænastan varð nógv ávirkað av koronafarsóttini, eru nú yvir 90 vitjanarvinir kring landið.



Í Tórshavn eru umleið 40 sjálvboðin í Vitjanartænastuni. Vitjað verður á Boðanesheiminum, Lágargarði, Tjarnagarði, eldrasambýlunum, og Ellisheiminum og eisini heima við hús. Vitjanartænastan í Tórshavn hevur verið við til nógv tiltøk í 2021. Millum annað er Vitjanartænastan partur av verkætlanini *ABC fyri sálarliga heilsu* hjá Fólkaheilsuráðnum, og luttók í seks samstarvsfundum um ABC kring landið í 2021. Til ABC Sálarheilsudagin var Vitjanartænastan umboðað við einum bási í Perluni. Tá Alzheimerfelagið fylti 20 ár, var Vitjanartænastan eisini umboðað við einum bási til hátíðarhaldið í Norðurlandahúsinum, har møguleiki var at hoyra um tænastuna. Eisini varð tilhaldið í Kollafirði vitjað, har sagt var frá søgum og upplivingum.

Allir vitjanarvinir í Tórshavn savnaðust til eina hugnaløtu 1. mai 2021, og fingu smyrjibreyð, sum Gist & Vist hevði latið, og lagkøku, sum Miðberg hevði latið.

Vitjanartænasturnar kring landið høvdu eina hugnaliga jólaløtu í hølunum hjá Reyða Krossi í Tórshavn. Á hesi løtu fingu øll greitt frá, hvussu tey vóru blivin vitjanarvinir og um upplivingar hesum viðvíkjandi.

Í Vágoy eru áleið 8 sjálvboðin.  Tey hava verið við til ymisk tiltøk í kommununi, har tey hava fortalt um arbeiðið, men í løtuni er tørvur á fólkum at vitja.

Í Vitjanartænastuni í Norðoyggjum eru Maria Olsen og Gerda Absalonsen samskiparar. Í Norðoyggjum vóru 14 virknir vitjanarvinir í 2021. Vitjað verður í privatheimum, á bústovnum, og á røktarheimum áleið einaferð um vikuna, umleið

hálvanannan tíma hvørja ferð. Tá vitjað verður fyrstu ferð, eru samskipari, vitjanarvinur og tann sum verður vitjaður, altíð saman eina løtu, fyri at kunna ganga ynskjunum hjá tí vitjandi og hjá vitjanarvininum á møti. Sum heild gekk árið 2021 væl í Vitjanartænastuni í Norðoyggjum. Samskiftið fer fram við messenger á facebook og telefon. Eisini kontakta samskipararnir fyristøðufólk á røktarheimum og avvarðandi við jøvnum millumbilum. Vitjanartænastan hevur gott samstarv við Visitator hjá Norðoya Bú- og Heimatænastu, sum vitjar tey, ið eru 75 ár og eldri og avvarðandi teirra.

Í september 2021 var skipað fyri tiltaki í Suðuroy, í sambandi við, at Vitjanartænastan í Suðuroy varð sett á stovn, og í oktober varð kunnandi tiltak og drekkamunnur, tá Vitjanartænastan í Vestmanna varð sett á stovn.

Orðini niðanfyri eru frá einum vitjanarvini í 2021:

> “Hettar hevur givið mær meira, enn eg haldi eg gav henni, bara tað at kunna verða har, eg kundi hugsað mær eina løtu at syrgja hana, áðrenn eg fari í gongd aftur. Tí vil eg eisini takka fyri høvið, at eg slapp at kenna hendan persón so væl og inniliga, hettar sum Reyða Kross Vitjanartænastan ger er eitt ótrúligt arbeiði fyri eldri fólk og ikki minst eisini fyri okkum, sum hava eina løtu til teirra”

Ein annar vitjanarvinur skrivar:

> “Tað gongur sera væl. Í fyrstani koyrdu vit mest biltúr, og fóru kanska inn á eina kaffistovu, men nú eru vit farnir at ganga túrar á rennibreytini. Tað er tungt hjá honum, men sera gott fyri hann, og hann er altíð fúsur, tá hann ikki hevur ov nógvar krampar. Deiligir tímar - eg haldi tað eru millum bestu tímarnar hvørja viku hjá okkum báðum. Sera glaður fyri, at eg meldaði meg til hetta”

## Saman basa vit einsemi

Í døgunum 27. apríl til 6. mai 2021 setti Reyði Krossur sjóneykuna á avbjóðingar, ið standast av einsemi og sosialari avbyrging, sum hava verið ómetaliga viðkomandi eftir koronufarsóttina. Nýggj gransking úr Danmark vísir, at einsemi er ein tann størsta hóttanin ímóti okkara trivnaði. Granskingin vísir eisini, at tað er ein neyvur samanhangur ímillum trivnað og tørv á heilsutænastum. Tað merkir, at gera vit íløgur í okkara sálarheilsu, er nógv at vinna, bæði fyri einstaklingin og fyri samfelagsbúskapin.

Við átakinum ”Saman basa vit einsemi” var skipað fyri seks spennandi tiltøkum kring landið við áhugaverdum framløgum, søgum og livandi tónleiki. Tiltøkini vóru í Klaksvík, Sørvági, Skálavík, Tórshavn, Runavík og á Tvøroyri. Til tiltøkini greiddi Suni Poulsen, sálarfrøðingur, frá um einsemi og avbjóðingar, ið kunnu

standast av einsemi, sjálvboðin úr Reyða Krossi fortaldu um Vitjanartænastuna til einsamallar borgarar og Familjuvinir til tilflytarar, Dragana Popovic segði frá hennara søgu sum tilflytari í Føroyum, og stuttfilmur varð vístur. Tiltøkini vóru ókeypis, og øll vóru vælkomin. Tey vóru sera væl eydnað, og fleiri sjálvboðin løgdust afturat bæði Vitjanartænastuni og Familjuvinum kring alt landið. Fleiri fólk hava umbiðið tænasturnar.




## Mat- og Klædnahjálpin

Mat- og Klædnahjálpin hjálpir fólki í Føroyum, ið ikki eru so væl fyri fíggjarliga, við at lata klæðir til børn og døgurðamat til einstaklingar og familjur. Talan er eitt nú um barnafamiljur, har foreldur eru lesandi, støk foreldur, familjur, har annað foreldrið hevur mist arbeiðið, familjur, ið hava lága inntøku, og familjur, ið eru raktar av sjúku og/ella av ymiskum sosialum trupulleikum.

Stórur tørvur var á Mat- og Klædnahjálpini í 2021. Tilsamans fingu 412 fólk hjálp frá Mat- og Klædnahjálpini í 2021, harav 282 vóru børn. Umleið helvtin av fyrispurningunum í 2021 vóru um hjálp til klæðir, góð 33% vóru um bæði mat- og klædnahjálp, og góð 20% av fyrispurningunum vóru um mathjálp. Við góðum stuðulsavtalum við fyritøkur kostaði hendan tænasta Reyða Krossi áleið kr. 159.000.

Mat- og Klædnahjálpin er skipað við einum virksemisleiðara, og tilsamans eru sjey sjálvboðin virkin í bólkinum, sum arbeiðir væl saman, og skiftist um at hava vakttelefonina. Sum oftast hevur ein sjálvboðin telefonina í 14 dagar.

Klædnahjálpin varð sett á stovn í 2013, og veitir góð barnaklæðir frá endurnýtsluni hjá Reyða Krossi. Í 2020 varð Mathjálpin løgd afturat tænastuni. Mathjálpin letur í høvuðsheitum frystan døgurðamat. Øll, sum fáa klædnahjálp fáa eisini bjóðað mathjálp.

Mat- og Klædnahjálpin fekk nýtt lýsingatilfar í 2021. Talan er um bæði størri og smærri plakatir, umframt postkort. Lýsingatilfarið verður hongt upp í læknaviðtalum, hjá Gigni og onnur viðkomandi støð kring landið.

Aftur í 2021 var lýst við Mat- og Klædnahjálpini hjá Reyða Krossi í Jólahjálpini í samstarvi við Barnabata. Hendan lýsingin merkist væl, og eftirspurningurin eftir mat- og klædnahjálp økist í tíðini eftir, at tíðindini um Jólahjálpina fara út.

Øll, sum hava tørv á mat- ella klædnahjálp, eru vælkomin at seta seg í samband við Mat- og Klædnahjálpina á tlf. 283670. Foreldur eru hjartaliga vælkomin at seta seg beinleiðis í samband við Mat- og Klædnahjálpina, Hetta kann tó eisini vera umvegis onnur – eitt nú næstringar, heilsusystrar, læknar, jarðarmøður, lærarar og onnur góð fólk. Á henda hátt kunnu vit best røkka teimum, ið hava tørv á tænastuni.

## Samstarv við Barnabata um Jólahjálp

Tíverri eru nógvar barnafamiljur her í Føroyum, ið hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman, og kanska serliga um jólini. Tí gleðist Reyði Krossur um at samstarva við Barnabata um Jólahjálp á triðja ári á rað. Jólahjálpin er skipað til frama fyri barnafamiljur, sum liva undir trongum fíggjarligum korum. Til hetta endamál læt RKF gávukort fyri tilsamans kr. 264.000, sum er kr. 1.000 til hvørja av teimum 264 barnafamiljunum í Føroyum, ið fingu jólahjálp. Gávukortini vóru latin við góðum avsláttri frá Føroya Keypsamtøku, sum altíð er ein trúfastur stuðul hjá RKF.

## Jólagávur til Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum, Barnaheimið og Kvinnuhúsið

RKF hevur í fleiri ár latið bókagávur til børn í desember mánaði, og aftur í 2021 var hetta góða átakið framt.

Bøkurnar vóru latnar til Barna- og Ungdómspsykiatriina P20, til Barna- og Ungdómspsykiatrisku Dagdeildina P30, og til Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum. Harumframt vóru bókagávur latnar til Barnaheimið og til Kvinnuhúsið.

Leiðarin av bókasøluni hjá Reyða Krossi savnar saman bøkur til børn og ung ígjøgnum árið, soleiðis at latið kann verða áleið 25-30 bøkur til hvørt stað upp undir jól.

Bókagávurnar frá RKF vóru væl móttiknar á øllum støðunum, og bæði starvsfólk og børn vóru sera glað fyri vitjanina og fyri bøkurnar, sum koma serstakliga væl við í gerandisdegnum.

## Integratión

Seinnu árini eru alsamt fleiri tilflytarar komnir til Føroya, og fleiri teirra koma úr londum uttanfyri ES. RKF ynskir at hjálpa við at fremja integratiónina fyri nýggju borgararnar.

## Familjulegan

RKF hevur síðani 2018 skipað fyri familjulegu, ætlað fólki við tilflytarabakgrund. Legan verður vanliga hildin í oktobermánaði í Nesvík, og hevur verið sera væl eydnað. Endamálið við leguni er at betra um integratiónsøkið og trivnaðin hjá tilflytarum í Føroyum.

Arbeitt varð við at skipa fyri Familjulegu í døgunum 22.-24. oktober 2021. Evnið á ársins legu var “Sharing stories”, har luttakarar skuldu fáa høvi at deila teirra søgur og hoyra persónligar tvørmentanarligar søgur frá øðrum. Umleið 70 fólk høvdu teknað seg til leguna í 2021, og umleið 10 høvdu teknað seg sum sjálvboðin at hjálpa til við ymsum. Tíverri varð neyðugt at avlýsa leguna í 2021 orsakað av brádliga vaksandi koronutølunum.

## Familjuvinir

Í 2021 var veruliga sett gongd á arbeiðið við Familjuvinum/Family Network. sum er eitt slag av eini vitjanartænastu og einum netverki fyri tilflytarar í Føroyum. Endamálið við tænastuni er at arbeiða fyri at tilfluttar familjur ella einstaklingar, ið lítið ella onki tilknýti hava til Føroyar, fáa so góða byrjan í nýggja landinum sum gjørligt. Hetta verður gjørt við at veita tilfluttum útlendskum familjum ella einstaklingum møguleika at koma í samband við føroyskar familjur ella einstaklingar. Royndir úr øðrum londum vísa, at tilflytarar fella skjótari til í nýggja heimlandinum, læra mál og mentan skjótari, og tey støðast og trívast betur, um tey megna at skapa sær eitt netverk.

Tilsamans 29 føroyingar hava teknað seg sum sjálvboðin í Familjuvinir, og 7 vinapør eru sett saman. Í løtuni er stórt yvirskot av føroyingum í mun til tilflytarar, og tí verður arbeitt við at upplýsa tilflytarar betur um tænastuna.

# INNSAVNINGAR

RKF skipar fyri innsavningum, fyri at hjálpa, har neyðin er størst. 2021 var sum heild eitt gott ár fyri innsavningarnar.

## Filateli

Inntøkan frá filateli er støðugt minkandi. Talið av brøvum er fallandi og harvið eisini talið av frímerkjum. Tilfarið sum kemur inn verður klipt og sent til Danmarkar til sølu. Inntøkan fyri 2021 var kr. 5.166.

## Peningakistlar

Ein peningakistil er hjá Visit Tórshavn í Steinatúni. Har kemur heilt fitt av peningi í, og í 2021 vóru kr. 6.661 latnar í tann kistilin. Ein kistil stendur eisini á flogvøllurin,

og har vóru kr. 7.686 latnar í fyri árið 2021. Kistilin á flogvøllinum hevur ikki verið nóg sjónligur, men arbeitt verður fyri at fáa kistilin fluttan á eitt betri pláss.

## Landsinnsavningin 2021

Eins og í 2020, var Landsinnsavningin í 2021 skipað sum ein beinleiðis sjónvarpssending, heldur enn ein hurð-til-hurð innsavning, til tess at avmarka smittuspjaðing. Skrivstovan og sjálvboðin í Landsinnsavningini stóðu fyri at samskipa sendingina vegna RKF.

Sendingin var send beinleiðis úr Løkshøll í Runavík sunnukvøldið 21. november 2021, og varð víst á sjónvarpsrásini Rás1. Í sendingini vóru áhugaverdar samrøður og innsløg um hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi í Føroyum og kring heimin, umframt tónleikaframførslur við Týr, Gretu, Leu Kampmann og Robert McBirnie. Harumframt var lutakast um ein spildurnýggjan Mazda MX-30 el-bil millum øll, ið ringdu á tel. 90565, og stuðlaðu við 150 krónum.

Aftur hesuferð eydnaðist Landsinnsavningin framúr væl, og góðar 3,4 milliónir krónur komu inn. Við hesum úrsliti fær RKF munandi betri grundarlag at skipa hjálpararbeiði, har tørvur er á tí, bæði í Føroyum og kring heimin.

# ALTJÓÐA HJÁLPARARBEIÐI

RKF lat í 2021 kr. 4.650.000 til altjóða humaniterar verkætlanir í 7 ymiskum londum. Verkætlanirnar høvdu í høvuðsheitum til endamáls at fremja kropsliga og sálarliga heilsu, útbúgving, ávaringarskipanir fyri veðurlagshóttanir, lívsgrundarlag, umframt átøk ímóti koronasmittuni og aðra neyðhjálp.

Tíverri hevur RKF ikki fingið allar frágreiðingarnar fyri altjóða átøkini, ið RKF stuðlaði í 2021, av tí at fleiri av verkætlanunum halda fram í 2022. Í teimum førum, har vit hava fingið frágreiðing, er tað nevnt í lýsingini niðanfyri.

## Karmar

RKF samstarvar við Føroya Landsstýrið um at veita altjóða humanitera hjálp. Samstarvsavtalan inniber millum annað, at Landsstýrið letur ein part av játtanini til humanitera hjálp til RKF. Við avtaluni fær RKF eisini betur skipað sítt virksemi, eitt nú við at senda arbeiðsorku úr Føroyum út í heim.

Harumframt hevur RKF samstarvsavtalu við Reyða Kross í Danmark (RKiD) um veiting av altjóða humaniterari hjálp. Samstarvsavtalan við RKiD inniber eitt nú, at stuðulin, ið RKF veitir til altjóða átøk, verður sendur út í heim umvegis RKiD,

Menningarætlanin hjá RKF fyri humanitert arbeiði í Føroyum og úti í heimi 2018-2020, lýsir framtíðar visjónina hjá felagsskapinum, sum er:

*at víðarimenna førleikarnar at basa og lætta um menniskjaliga neyð og líðing við at virka fyri effektivari humaniterari hjálp til tey mest sárbæru, bæði í Føroyum og í øðrum londum.*

Øll altjóða átøk og stuðul frá RKF í 2021 vórðu brúkt sambært samstarvsavtaluni við Landsstýrið, samstarvsavtaluni við RKiD og sambært Menningarætlanini hjá RKF. Arbeiðið at gera eina nýggja menningarætlan hevur tíverri verið seinkað orsakað av koronufarsóttini, men verður tøkt í næstum.

Í 2021 læt Landsstýrið kr. 2.000.000 til altjóða humaniterar verkætlanir hjá Reyða Krossi, herundir eisini til útsend starvsfólk hjá RKF.

## Altjóða starvsfólk hjá RKF



*Vár (t.v.) saman við starvsfelaga í Kongo*

RKF virkar fyri at økja um føroyska luttøku í altjóða hjálparararbeiði. Frá november 2019 til november 2021 var Vár í Dali sett í starv á altjóða deildini hjá Reyða Krossi í Keypmannahavn. Vár hevur gjørt eitt megnararbeiði, og sum umboð fyri Reyða Kross Føroya hevur Vár starvast við at samskipa, íverkseta og leggja hjálparararbeiði til rættis úti í heimi.

í 2021 var Vár í Kenja, har hon samskipaði hjálparátøk í samstarvi við Reyða Kross í Kenja. Átøkini snúðu seg um at avmarka koronufarsóttina og at veita upplæring og venjing innan sálarheilsu og psykososialan stuðul.

Í mai 2021 var Vár útsend til Kongo, í sambandi við eitt álvarsamt eldgos, sum breyt út eystanfyri í landinum. Fleiri hundraðtúsund fólk vóru noydd at flýggja, og nógv fólk hvurvu í ruðuleikanum. Reyði Krossur á staðnum arbeiddi fyri at veita neyðhjálp í rakta økinum. Arbeiðið hjá Vár snúði seg í høvuðsheitum um at hjálpa at seta eina bráðfeingis hjálparmiðstøð upp, og at tryggja raksturin av hesari hjálparmiðstøðini.

Í november 2021 var Sanna Nolsøe Djurhuus send til Malavi sum umboð fyri Reyða Kross Føroya. Í Malavi arbeiðir Sanna í høvuðsheitum við ávaringarskipanini Forecastbased Action (FbA), sum nýtir nýmótans tøkni, veðurfrøði og váðalýsingar til at spáa um veðurlagskreppur í framtíðini. Endamálið við skipanini er at minka um avleiðingarnar av eitt nú vatnflóð í Malavi. Sanna fer millum annað at arbeiða við at menna FbA skipanina, og at stuðla undir arbeiðið at savna inn viðkomandi kunning og dátur, soleiðis at tað er møguligt at seta tiltøk í verk, áðrenn vanlukkan rakar.

Innanfyri karmarnar av samstarvsavtaluni við Landsstýrið rindar RKF fyri útbúgving og løn hjá altjóða starvsfólkum.



*Sanna (t.v.) saman við starvsfeløgum í Malavi*

## Kunningar- og rekrutteringsátøk

Avtala er gjørd við RKiD um rekruttering av starvsfólkum í Føroyum. Lýst verður við leysum størvum innan hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi í føroysku miðlunum og á heimasíðu og sosialum miðlum hjá RKF. Av tí at RKiD og RKF samstarva um altjóða hjálpararbeiðið, gongur sjálv umsóknargongdin umvegis starvsportalin hjá RKiD.

Arbeitt verður við at skipa fyri kunningartiltøkum á hvørjum ári, har gestarøðarar frá øðrum Reyða Kross feløgum vera bodnir á vitjan at greiða frá, hvussu hjálpararbeiðið ítøkiliga gongur fyri seg úti í heimi.

Undanfarin ár hevur RKF sent sjálvboðin á kunningarferðir til hjálparátøk kring heimin. Orsakað av koronufarsóttini var tíverri ikki gjørligt at senda nakran avstað í 2021.

## Ófriður í Etiopia

Ófriður og ótryggleiki hava myndað støðuna í Tigray landslutinum í norðara partinum av Etiopia síðan 2020. Samanbrestir hava havt við sær, at stórur partur av fólkinum hava tørv á bráðfeingis verju og humaniterari hjálp. Bæði eldri fólk, børn og kvinnur eru í serligum vanda fyri harðskapi, og stórur tørvur er á bráðfeingis heilsutænastum, lívbjargandi útgerð, skjóli, seingjarplássum, og atgongd til vatnveitingar, reinføri og aðrar grundleggjandi tænastur.

RKF læt kr. 500.000 til hjálparátøk hjá Reyða Krossi í Etiopia í 2021. Pengarnir fóru millum annað til bráðfeingis humanitera hjálp, at tillaga hjálparátøk til viðkvæmar bólkar, til fyrstuhjálp og til at menna viðkomandi førleikar hjá Reyða Krossi í Etiopia.

Sambært frágreiðing frá Reyða Krossi í Etiopia hava hjálparátøkini, ið fingu stuðul úr Føroyum, gingið væl og eftir ætlan. Peningurin frá RKF rakk til lívbjargandi hjálp til 3.681 fólk í Etiopia og til skjól til 420 fólk. Peningurin úr Føroyum fór eisini til at stuðla undir sjúkraflutningstænastuna, sum Reyði Krossur stendur fyri at reka í Etiopia. Stuðulin úr Føroyum merkti eitt nú, at 2.000 fólk fingu hjálp frá sjúkraflutningstænastuni, harímillum nøkur av teimum viðkvæmastu menniskjunum, so sum kvinnur, ið skuldu eiga.




## Neyðhjálp til Jemen

Í fleiri ár hevur Jemen verið rakt av bæði ógvusligum ósemjum og náttúruskaptum vanlukkum. Vápnað stríð hevur herjað í fleiri ár, og fleiri milliónir menniskju eru flýdd frá húsi og heimi, meðan tveir triðingar av fólkinum í Jemen líða hungursneyð. Almennar tænastur eru so gott sum ikki til í Jemen - sjúkrahús og heilsudeplar eru antin løgd í oyði av krígnum ella eru álvarsliga undirfíggjað. Reyði Krossur arbeiðir ótroyttiliga við at betra um heilsutænastur, og at veita mat og gerandisvørur til so nógv neyðstødd, sum gjørligt.

Tí læt RKF kr. 775.000 til hjálparátøk í Jemen, sum høvdu til endamáls at skapa betri atgongd til grundleggjandi tænastur, so sum heilsutænastur, harímillum umvæling av hølum og veitan av heilivági og útgerð, umframt at upplæra lokal sjálvboðin í at veita sálarligan stuðul til børn og vaksin. Serligur dentur verður lagdur á at tryggja, at tey mest viðkvæmu hava atgongd til tænasturnar.

Sambært frágreiðing frá Reyða Krossi í Jemen rakk peningurin úr Føroyum til at veita heilsutænastur til 12.611 neyðstødd í Jemen, og var við til at tryggja, at 1.661 fólk fingu atgongd til psykososialan stuðul.

## Verja til neyðstaddar ungar kvinnur í Bangladesh

Cox Bazar í Bangladesh er heimsins størsta flóttafólkalega. Frá 2017 til 2021 flýggjaðu útivið 900.000 fólk til Cox Bazar undan harðskapi og ágangi í Myanmar. Meginparturin av teimum, ið flýddu, vóru kvinnur og børn. Tey flestu hava framvegis sálarlig mein av ógvusliga ágangpinum og harðskapinum, sum teimum var fyri í Myanmar, samstundis sum trongu og vánaligu korini á flóttafólkaleguni kunnu elva til angist og órógv. Afturat hesum er Bangladesh eisini eitt av londunum í Asia, sum er harðast rakt av koronu.

RKF læt í 2021 eina hálva millión krónur til hjálparátøk í Cox Bazar. Talan er millum annað um hjálparátøk ímóti koronu, og átøk at tryggja vernd og vælferð hjá neyðstøddum ungum kvinnum.

Peningurin var eitt nú brúktur til at:

- stuðla undir koppsetingarátøkum og tryggja, at útlutingin av koppsetingini er munagóð og rættvís,
- veita psykososialan stuðul til sárbærar menniskju í Cox Bazar leguni, har givið verður serligt far um ungar gentur og børn,
- útbyggja verandi verndarátøk, so sum barnaverndarskipanir.




*Við stuðli úr Føroyum, hjálpti Reyði Krossur í Bangladesh myndugleikunum at koppseta 16.221 fólk í tíðarskeiðnum 16. – 19. november 2021.*

## Humaniter kreppa í Afghanistan

Humanitera støðan í Afghanistan er ómetaliga døpur, og alsamt fleiri fólk verða rikin frá húsi og heimi. Støðan í Afghanistan er eitt úrslit av áralangum stríði, fátækradømi og ringasta turkri í fleiri áratíggju. Harumframt hevur covid-19 tyngt ta frammanundan vánaligu heilsuskipanina, og bankasanktiónir hava ført til búskaparligt hóttafall, soleiðis at eitt nú alment sett starvsfólk, so sum læknar, lærarar og heilsuhjálparar ikki fáa teirra løn. Álvarsom hungurneyð ger um seg, og talið á børnum, sum eru innløgd á sjúkrahúsum hjá Reyða Krossi, veksur støðugt. Talan er um størstu humaniteru kreppuna í heiminum, sambært ST.



Í 2021 læt RKF hálva aðru millión krónur til hjálparátøk í Afghanistan. Peningurin fór millum annað til heilsudeplar og sjúkrahús hjá Reyða Krossi í Afghanistan, til at betra um sálarheilsuna hjá børnum og ungum og til neyðhjálp, so sum mat, vatn og verju.

## Hjálparátøk í Malavi

Umframt at teljast millum heimsins fátækastu lond, er Malavi eisini ímillum tey londini, ið verða harðast rakt av náttúruvanlukkum. Serliga stórur er vandin fyri vatnflóðum. Tí hevur Reyði Krossur síðani 2017 arbeitt við FbA ávaringarskipanini, sum nýtir nýmótans tøkni, veðurfrøði og váðalýsingar til at meta um kreppur í framtíðini. Endamálið við skipanini er at minka um avleiðingarnar av náttúruvanlukkum, so sum vatnflóð. Hetta verður gjørt við at savna inn viðkomandi kunning og dátur, soleiðis at tað er møguligt at seta tiltøk í verk, *áðrenn* vanlukkan rakar. Hetta kann til dømis hjálpa at tryggja matframleiðsluna í landinum, við at syrgja fyri, at akurin verður skorin tíðliga, at djór verða flutt o.tíl. FbA virkar eisini fyri, at teir mest viðkvomu samfelagsbólkarnir fáa hjálp undan og undir einari kreppu.

Sum nevnt omanfyri, setti RKF eisini eitt starvsfólk í starv í Malavi - Sanna Nolsøe Djurhuus byrjaði í november 2021 í starvinum, har hon í eitt ár kemur at arbeiða við hjálpararbeiði innan FbA.

RKF læt kr. 775.000 til hjálparátøk í Malavi í 2021.

Harumframt læt RKF kr. 100.000 til Barnalandið í Malavi. Barnalandið í Malavi hjálpir millum annað foreldraleysum og útsettum børnum við at stuðla teimum at fara undir skúlagongd, og bjóðar barnaansing, mammubólkar og ungdómsarbeiði. Ein partur av hesi játtanini er frá privatum gevarum, sum hava oyramerkt stuðulin til Barnalandið í Malavi, og ein partur er frá RKF.

## Jarðskjálvti á Haiti

Hin 14. august 2021 var ein ógvusligur jarðskjálvti á Haiti. Fleir enn tveytúsund fólk lótu lív í jarðskjálvtanum, fleir enn tíggjutúsund vórðu særd, og fleiri hundraðtúsund hús og heim vóru lagd í oyði ella fingu skaða.

RKF læt kr. 200.000 til humaniter átøk á Haiti eftir jarðskjálvtan. Peningurin var eitt nú brúktur til at hjálpa at finna burturblivin fólk, at veita heilsu- og reinføristænastur, mat og drekka, skjól og verju.

## Øll hava rætt til koppseting

í 2021 lýsti RKF við átakinum "Øll hava rætt til koppseting". Átakið hevði til endamáls at savna pening til verkætlanir kring heimin, ið virka fyri at tryggja koppsetingar til heimsins neyðstøddu.

Koronafarsóttin er bæði ein váði fyri fólkaheilsuna og ein humaniter avbjóðing fyri menningarlond, har trygdarnet og heilsumyndugleikar frammanundan eru undir stórum trýsti. Í Føroyum eru vit í tí hepnu støðu, at vit hava eitt væl virkandi heilsuverk, ið veitir ókeypis koppsetingar ímóti koronusmittuni. Fyri nógv menniskju kring heimin eru møguleikarnir fyri koppseting tíverri sera avmarkaðir. Sum stuðulseind hjá myndugleikum samstarvar Reyði Krossur við nærsamfeløg kring heimin fyri at tryggja betri atgongd til koronukoppsetingar fyri øll. Reyði Krossur leggur serligan dent á landaøkir og samfelagsbólkar, ið eru harðast rakt av koronu, eitt nú eldri, fólki við kroniskum heilsuavbjóðingum, flóttafólk, fátøk, heimleys o.o.

Við "Øll hava rætt til koppseting" varð heitt á føroyingar um at lata eina gávu til nevnda endamál umvegis Reyða Kross. Tá samanum kom sendi RKF tilsamans kr. 300.000 avstað í sambandi við átakið. Partur av hesum peningi er egin uppsparing hjá RKF, og partur er frá privatfólki, skúlum í Føroyum o.ø.

Helvtin av teimum kr. 300.000 fóru til koronuátøk í Bangladesh, har arbeitt verður, saman við landsins myndugleikum, við at samskipa og tryggja, at útlutingin av koronukoppsetingini er munagóð og rættvís og til gagns, har neyðin er størst. Hin helvtin, kr. 150.000, varð send til Kenja, har Reyði Krossur hevur ein umráðandi leiklut í at avmarka koronafarsóttina millum borgararnar í landinum, og arbeitt verður tætt saman við heilsumyndugleikunum at samskipa útlutanina av koronukoppsetingum.

Hjartans tøkk til øll, ið hava stuðlað átakinum.